# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Fløskupostur



Hey tú/tit.
Vit búgva í Havn, men beint nú
eru vit við Gjógv.
Í dag er tað tann 3 august 2007.
Vit búgva á XXXXXXXXX og
tlf er XXXXXX
Tú ert vælkomin heim til okkara.
Hvissi tú kemur til okkara,
so tak brævið við.
Heilsan
Aron, Lovisa
og
Poula
P.S. Aron, Lovisa og Poula hava
skriva brævið.
P.P.S. Vit hopa at tú
kemur.!!
Bei Bei

*Hetta er brævið sum lá inni í pløskupostinum*

Nú ein dagin fingu vit eitt skriv inn á redaktiónina um ein fløskupost, sum var sendur frá Gjógv tann 3. august 2007, og var funnin í Kettuvík í Leirvík á heysti 2008 av Olafi Hansen.

At senda fløskupost er eitt gamalt fyribrigdi, og nógvir fløskupostar hava ferðast longri enn hesin sum er komin frá Gjógv til Leirvíkar. Men tað er altíð stuttligt at finna ein slíkan fløskupost við eini heilsan í. Her eru tað Aron, Lovisa og Poula, sum búgva í Havn, ið hava sent eina heilsan í fløskupostinum. Kanska tey fáa ella hava fingið vitjan úr Leirvík.

*mg*





*Fløskuposturin varð funnin í Kettuvík, sum er norðan fyri Leirvík. Vegurin framvið Kettuvík, sum varð gjørdur til at koyra tilfar til Norðoyatunnilin, verður vanliga nevndur Strandvejen*

*Mynd: Gudny Langgaard*

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at okkara kæra mamma, vermamma, omma og systir

**Marjun Elida Joensen**
Klaksvík

andaðist í heiminum leygarmorgunin 15. august,
60 ára gomul.

Bønarhald verður í kapellinum fríggjadagin kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Betesda leygardagin kl. 13.30.

*Fyri tey avvarðandi*
**Jón, Petur og Malvinus**

Tey ið ynskja lata blómur ella krans, kunnu ístaðin lata
eina peningagávu til Zarepta ella Leguhúsið í Nesvík,
konta í peningastovnunum.

---

†

Kistan við

**Almu Rasminu Svanhildu Hammer**
Hvalba

fer úr kapelinum úr Suðuroyar Sjúkrahúsið
fríggjadagin 21. august kl. 17 í Vitnið í Hvalba.
Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13.

*Fyri tey avvarðandi*
**John, Marnar, Ingmar og Eleina**

Tey, ið vilja minnast Almu kunnu lata eina peningagávu til Zarepta,
konta í peningastovnunum.

---

†

### Andlát og jarðarferðir

**Alma Hammer, Hvalba**, andaðist mánadagin á Suðuroyar sjúkrahúsi, 85 ára gomul.

### Dagurin

**19. august. Sebaldus.** Sigst at hava verið guðrøkin danskur kongssonur, sum var trúlovaður franskari prinsessu. Men hann fór frá henni og gav seg í kleystur í Nürnberg, har hann doyði í hvussu so er fyri ár 1070.

*Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*